

*Anna Lousia Joensen frá Ferðslutrygd greiddi frá, hvussu tey hesaferð hava sett fokus á menniskjansliga aspektið av ferðslutrygdini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Ingi Gunnarsson varð mikudagin valdur sum fyrsti ferðsluvinurin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd*
*Mynd: Ráðið fyri Ferðslutrygd*

# Leita eftir ferðsluvinum

**Við nýggjum slagorðum um ferðsluvinir og hjartarúm í ferðsluni, setir Ráðið fyri ferðslutrygd enn einaferð fokus á ferðsluna**

FERÐSLUTRYGD
*Jákup Mørk*

Kunning, kunning og aftur kunning. Tað eru helst fremstu lyklaorðini í arbeiðinum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, tá ferðsluvanlukkur og –óhapp skulu fyribyrgjast. Hesa vikuna verður so enn eitt stig tikið á leiðini móti málinum um 0-hugsjónina.

### Betri ferðslumentan

Við átakinum, Hjartarúm, sum er á Torginum í SMS, verður fokus hesaferð sett á tann meira menniskjansliga partin av ferðslutrygdini. Hjartarúm merkir jú eisini, at vit skulu koma hvørjum øðrum við, og at vit skulu ansa eftir, hvussu vit fara um onnur fólk. Ikki minst er hetta av avgerandi týdningi í ferðsluni, har tankaloysi, sjálvsókni, ov høg ferð v.m. í ringasta føri kunnu hava ræðuligar avleiðingar.

Sum ein part av arbeiðinum at náa hesum máli, verður Ráðið fyri Ferðslutrygd nú eisini víðkað, soleiðis at almenningurin í størri mun fær lættari atkomu til stovnin.

Tað verður gjørt á tann hátt, at privat-persónar nú kunnu tekna seg sum ferðsluvinir. At gerast ferðsluvinir merkir fyrst og fremst, at hesi fáa eitt slag av atkomulimaskapi í Ráðnum fyri ferðslutrygd. Atgongd og talurætt til ársfundir er ein partur av hesum, men umframt hetta, so er endamálið fyrst og fremst at betra um ferðslumentanina.

### Partur av politikkinum

Viðtøkurnar hjá RFF vórðu fyri tvemum árum síðani broyttar, soleiðis at latið varð upp fyri slíkum limaskapi. Fyrstu tíðina hevur talan tó bert verið um virki, sum partvíst hava verið ein partur av fíggjarliga grundarlagnum undir RFF, men sum so sanniliga eisini kunnu viðvirka beinleiðis til eina betraða ferðslumentan.

Aðrastaðni er tað vorðið alt meira vanligt, at ferðslupolitikkur eisini er ein partur av starvsfólkapolitikkinum hjá einum virki. Bæði tí hetta kann skapa ein betri trivna, men so sanniliga eisini tí alt fleiri virki hava sæð ein kontantan fyrimun í hesum. T.d. kann talan hjá einum stórum virki við nógvum bilum verið um eina rúgvu av spill-tíð og sjúkradøgum, tí fólk antin koma til skaða í ferðsluni, ella skulu nýta tíð og orku til at greiða støður, sum eru íkomnar í ferðsluni.

### Ingi fyrsti vinurin

Umframt at kunna um nýggja møguleika at gerast ferðsluvinur, so hevði Ráðið fyri Ferðslutrygd eisini valt at nýta høvið til at innlima fyrsta vinin. Her hevði RFF valt at takka Inga Gunnarsson fyri tað stóra arbeiðið, sum hann sjálvboðið hevur framt nógvu seinastu árini.

Millum annað var tað Ingi, sum í 1999 tók stig til at fáa í lag dagin ferðsludeyða, og hevur hann her staðið fyri at kalla allari samskipanini av degnum síðani. Hartil hevur hann ígjøgnum ár og dag framt eitt velduga stórt arbeiði ferðslutrygdini at frama.

# Norðoya Sambandsfelag havt aðalfund

**Umframt nevndarval varð eisini eftirmeting av fólkatingsvalinum á skránni og eisini var tosað um støðuna í fiskivinnuni**

AÐALFUNDUR
*tíðindaskriv*

Eini 20 fólk vóru møtt til aðalfundin á Sjómansheiminum og fegnaðis formaðurin um at Norðoya Sambandsfelag seinastu trý árini hevur fleirfaldað atkvøðutalið.

– Vit fingið nýggjan býráðslim, Hans Arne Bertholdsen, sum er valdur til formann í ferðslunevndini, segði formaðurin, John William Joensen, sum samstundis takkaði Elisabeth Joensen fyri arbeiðið, sum hon hevur gjørt í býráðnum.

Samstundis vísti formaðurin á, at flokkurin nú hevur fingið landsstýrismann úr Norðoyggjum, og varð høvið samstundis nýtt til at heita á Bjørn Kalsø um at fara í holt við yvirtøknuna av tilbúgvingini, sum er avtalað í samgonguskjalinum og sum er ein stovnur, sum náttúrliga eigur at liggja í Klaksvík.

Roknskapurin hjá felagnum var merktur av at tað í seinasta árið var bæði løgtings- og kommunuval.

### Nevndarval

Fyri valið stóðu John W. Joensen, Elisabeth Joensen og Karl Olgar Joensen, umframt tiltakslimirnir, Magnus Arge og Heðin í Frammistovu.

Karl Olgar bar seg undan afturvalið og í hansara stað var Poul Martin Rasmussen valdur.

Nevndin skipaði seg eisini á fundinum við John W. Joensen sum formanni, Erikka Elttør næstformaður, Elisabeth Joensen skrivari, Poul Martin Rasmussen kassameistari og John Kári Jacobsen nevndarlimur. Magnus Arge og Heðin í Frammistovu eru afturvaldir sum tiltakslimir.

### Fólkatingsvalið

Síðani var eftirmeting av fólkatingsvalinum á skránni.

Flokkinum var spáddur eina afturgongd men fundarfólkið staðfestið at afturgongdin í Norðoyggjum ikki var eins stór og í øðrum pørtum av landinum. Í Klakvík var afturgongdin 0,5 % og tá skal havast í hugað at flokkurin hevði eina framgongd í Klaksvík upp á heili 4 % við seinasta fólkatingsval.

Fundurin tók eisini til eftirtektar úttalilsini hjá formanninum, Kaj Leo Jóhannesen, tá hesin eftir valið alment hevur játtað at hann ikki nóg væl megnaði at fáa boðskap flokksins út til tjóðina.

Fundurin metti at flokkurin eigur at fylgja formanninum í hesum, og hvør í sínum lagið takað í egnan barm og saman lyfta tær avbjóðingar, sum standa fyri framman.

- Føroyska samfelagið og serliga fiskivinnan er í eini støðu har tað er avgerandi neyðugt at vit innanflokka eins og í samgongu við aðrar flokkar megnað at standa saman og ikki broyta kós hvørja ferð trupulleikar stinga seg upp, varð staðfestingin av fundinum, har eisini støðan í fiskivinnuni og serstakliga rækjuvinnuni var havd á munni.